
Jan Müller handar íslendska forsetanum, Ólafur Ragnar Grímsson føroysku oljubókina.

# Íslendski forsetin fekk føroysku oljubókina á Arctic Circle

**Jan Müller**

25.10.2015 - 20:22

Oljan.fo

Arctic Circle. Í sambandi við at trý umboð úr Føroyum við løgmanni á odda høvdu framløgur á Arctic Circle ráðstevnuni í Reykjavík nú um dagarnar, um Føroyar í Arktis, um føroyska oljuleiting og oljuvinnu og um Føroyar sum tænastumiðdepil í Arktis, var eisini íslendski forsetin, Ólafur Ragnar Grímsson tilsteðar og lýddi á.

Eftir framløgurnar var høvi at heilsa uppá forsetan. Tá nýtti  Jan Müller, journalistur høvi til at handa forsetanum  bókina “Oljan”, sum hann og Tróndur Djurhuus góvu út í fjør. Bókin, sum er ein gjøgnumgongd av føroysku oljusøguni, umrøður eisini íslendsku oljuleitingina. Í bókini er eisini mynd er  av íslendska forsetanum saman við stjóranum í Faroe Petroleum, Graham Steward. Forsetin takkaði fyri bókaverkið og ynksti eisini føroyingum góða eydnu við framtíðar oljuleitingini. Í føroysku framløgunum varð eisini kunnað um, at nýggj útbjóðing verður í 2017.




OLJAN